## Lívligur toppdystur

Tað hendi nógv, tá ið tvey av oddaliðunum í týsku bundesliguni spældu um vikuskiftið. Schalke 04 hevði vitjan av Hamburger SV, og lívligi dysturin endaði við javnleiki 3-3. HSV kom á odda 2-0 áðrenn steðgin, men tíðliga í seinna hálvleiki minkaði Schalke um munin, og ein spælari hjá HSV varð vístur út. Schalke javnaði, men hóast ein mann minni skoraði HSV til 3-2. Í yvirtíðini eydnaðist tó Schalke at javna til 3-3.



## Nygaard góðar vónir

Tað hevur gingið serstakliga illa hjá Randers FC í donsku superliguni í ár, og herfyri varð venjarin skiftur út. Álopsspælarin Marc Nygaard, sum hevur ættarbond í Føroyum, hevur tó góðar vónir. - Vit eru við at finna okkara gamla spæl framaftur, og tað er nakað, sum vit kunnu byggja víðari á, sigur Marc Nygaard við DR. Randers liggur aftast í superliguni við 4 stigum eftir 13 dystir.

## Borðið fangar báðar vegir

**Tað er heldur rangvørt, at FSF fyrst hartar feløg í eini roynd at halda formalia, fyri síðani at royna at snúgva seg undan egnum avtalum**



Jákup Mørk

Sjálvandi eru fýra og ein hálv millión nógvir pengar. Ikki minst, tá hesar brádliga skulu býtast út til 27 mans, sum hava tann fyrimun, at teir duga betur at spæla fótbólt enn tey flestu.

Og ja. Avtalan er órættvíst skrúvað saman á tann hátt, at hon bert tekur atlit til ein spurning – nevnliga um spælari hevur veri ðá vølli ella ikki. Og stendur verandi orðaljóð við, fær eykamálverjin, sum hevur sitið á beinkinum flestu dystirnar, onga krónu, meðan spælarin, sum hevur fingið onkran minutt sum innskiftari, uttan at hava verið í so øgiliga nógvum av dystunum, fær fulla upphædd.

Í so máta er skilligt, um roynt verður at skrúvað eina avtalu saman, sum í størri mun er solidarisk millum spælararnar. Men tað líkist eina undanstøkking av format, tá FSF samstundis roynir at skarva helvtina av bonus-upphæddini.

Føroyskur fótboltur hevur aftur í ár havt síni gølumál, og fyri tað nógva standast hesi av, at formalia ikki er uppfylt í feløgunum. Ein uppgáva, sum FSF annars hevur tikið hampuliga sterka hond um í eini roynd at geara feløgini til altjóða fótbólt anno 2009.

Og júst tí sær tað púrasta rangvørt út, tá FSF nú roynir at broyta gjørdar avtalur í eini roynd at sleppa bíligari.

Nú sær ikki út til, at spælararnir uttan víðari hava hug at bakka. Og sum danir plaga at taka til, so hava øll rætt í "de bagkloges rige".

Tí er neyvan hugsandi, at næsta bonus-avtalan inniheldur eins generøsar upphæddar fyri tey fyrstu plássini undir teimum 150. Og ivaleyst gav tað størri meining, um bonus-avtalan bygdi á ein progressivan stiga, har upphæddin vaks vaksandi fyri hvørt plássið undir teimum 150.

Men lat tað so vera galdandi fyri næstu avtaluna. Verandi avtala er gjørd. Nú at skula lasta spælarunum fyri grískheit, sum kann tarna landsliðsarbeiðinum, er ikki akkurát rætti mátin at gera tað uppá. Serstakliga ikki, tá FSF samstundis hevur fingið nýggja sjónvarpsavtalu, sum konsoliderar pengakassan somikið nógv, at tosað hevur verið um, at seta pening í grunn til stadionbyggjarí. So má stadion heldur bíða eitt hálvt ár.

# Vilja skerja bonus-upphæddina

**Tað gongur ongan veg hjá FSF og landsliðsspælarunum í samráðingunum, har FSF roynir at skarva helmingin av bonus-upphæddini**



Jákup Mørk

Avtalan inniber, at hvør landsliðsspælari fær 6.000 krónur fyri hvørt plássið, sum Føroyar eru niðanfyri 150 á FIFA-listanum við árslok í ár. Og tað gevur eina samlaða upphædd upp á 168.000 kr. fyri hvønn spælara - ella góðar 4,5 milliónir tilsamans fyri teir 27, sum hava verið á vøllinum í undankappingini.

Í fyrra lagi hevur FSF skotið upp, at bonus-upphæddin verður lækkað, soleiðis at hendan ikki verður meira enn 2,2 milliónir íalt.

Í øðrum lagi hevur ynski verið, at avtalan í størri mun varð býtt ímillum spælararnar. Sum er, gevur avtalan bert pening til teir, sum hava verið á vøllinum í undankappingini. Men tá er so eisini líkamikið, um hetta hevur verið í ein minutt ella allar 900 minuttirnar.

Jákup Mikkelsen, liðskipari á landsliðnum, er ein av teimum, sum var við til at forhandla avtaluna, og hann sigur, at fundurin fríggjakvøldið ikki broytti tað stóra.

- FSF setti sjálvandi sítt ynski fram, men vit tóku ikki undir við hesum. Og vit hava heldur ikki sett nakað mótuppskot fram, so í løtuni bíða vit bara.

Sum skilst, so eru spælararnir ikki serliga áhugaðir í at lækka samlaðu upphæddina, og Jákup Mikkelsen dugir illa at síggja, at býtislykilin millum einstøku spælararnar verður broyttur.

- Eg dugi væl at síggja, at avtalan kann tykjast órættvíst fyri summar. Men tað vil altíð vera trupult at bakka aftur, tá ein slík avtala er gjørd. Tí tað vil altíð verða onkur, sum tá stendur verri, sigur Jákup Mikkelsen.



Fagnaðurin var stórur og rokningin er tilsvarandi stór, eftir at føroyska fótbóltslandsliðið við sigrinum á Litava leyp upp eftir FIFA-styrkislistanum

# Krevja í minsta lagi silvur

**Svimjisambandið hevur nú ásett kravtíðir til føroyskar svimjarar, sum ætla sær uttanlands at kappast. Eitt nú er kravtíðin til Oyggjaleikir herd**



Jákup Mørk

Svimjisamband Føroyar hevur á starvsnevndarfundi herfyri samtykt kravtíðir til altjóða meistarastevnur, í samráð við landsliðsnevnd og høvuðsvenjararnar í føroysku svimjifeløgunum,

Talan er um eina gjøgnumgangandi kravtíðarskipan, har allar kravtíðir verða ásettar í mun til tað sum tað kravdi at vinna heiðursmerki á undanfarnu stevnu av sama slag. Vit kenna skipanina frá Oyggjaleikum, har kravtíðin teir seinastu nógvu Oyggjaleikirnar hevur verið fyrst sættbesta tíð á seinastu leikum, síðani fimtbesta, og nú at enda triðbesta tíð frá Oyggjaleikum á Rhodos, til at sleppa við til Oyggjaleikir á Álandi í summar. Ein einføld skipan sum øll hava skilt og tikið til sín, og sum vit tí ynskja at víðka til at umfata eisini luttøku á øðrum altjóða meistarastevnum.

Svimjisambandið hevur til HM, EM, EJM og NJM valt at leggja ein prosentpart afturat veikastu heiðursmerkjatíð, heldur enn at velja til dømis 20. bestu tíð, av tí at serliga EM-, EJM og NJM-stevnurnar eru merktar av at hava ein lítlan men ógvuliga sterkan hóp í ávísum kappingargreinum.

Til at gera skipanina so einfalda sum gjørligt, hevur Svimjisambandið tí avgjørt leggja ein prosentpart afturat veikasta heiðursmerkjatíð á undanfarnu stevnu av sama slag, til tær meistarastevnur har vit ikki regluliga kunnu vænta okkum at vinna heiðursmerki. Hugt hevur verið at menningini hjá okkara svimjarum, og at menningini í heiðursmerkjatíðum á undanfarnu altjóða meistarastevnum, og út í frá hesum hevur Svimjisambandið so í samráð við høvuðsvenjarar og landsliðsnevnd ásett fylgjandi kravtíðir til komandi HM, EM, EJM og NJM.

### Herd Oyggjaleikakrøv

Til Oyggjaleikir verða kravtíðirnar herdar, frá at vera triðbesta tíð á undanfarnu leikum, til nú at verða silvur- ella gull-tíð á undanfarnu leikum. Hetta tí at gongdin á seinastu fýra Oyggjaleikum benda á, at tað á Oyggjaleikum á Isle of Wight fer at krevja umleið eina silvurmerkjatíð frá Oyggjaleikum á Álandi, at vinna eitt bronsuheiðursmerki á Isle of Wight. Svimjisamband Føroya ynskir avgjørt at fáa minst líka góð úrslit á Oyggjaleikum á Isle of Wight, sum á Oyggjaleikum á Álandi í summar, og herdu kravtíðirnar skulu tí meira skiljast sum ein ábending um hvat ið krevst til at endurtaka succésina, enn sum eitt ynski um at minka um hópin.